
Tusk fer av Havnini til Danmarkar 21. juli 1925. Nógv fólk er komið at siga farvæl


Tusk siglir inn til Oslo


Farið verður í land í Oslo


Carl Johan og Óla Svend á einim hólmi í Oslofjørðinum

Restorff keypti hana, og vit fyltu hana við 200 tómum petroleumstunnum fyri at fáa hana at flóta. Tó áðrenn máttu vit nýta segldúk og tríggjar neytahúður at tætta hana við, tí hon lak. Hon varð so førd til Havnar og var liggjandi her í einar tríggjar vikur. Restorff vildi ikki lata hana fara avstað aftur, sum hon var.

At enda var kósin sett til Noregs, og í Stavanger varð hon bygd um og klassifiserað til hægsta Lloyds. Í einum Stavangerblað var skrivað grein um "et skib med Segldugsbund" við viðmerkingini: "De bløde danske er nok ikke saa bløde alligevel." Tá vóru føroyingar roknaðir at vera danir í Noregi. Betzy hevði ligið so leingi í Havnini, at neytahúðirnar vóru rotnaðar og luktaðu sum pestin, tá skipið varð tikið uppá land.

Tá Betzy var gjørd aftur, fór hon aftur til Føroyar við saltfarmi, og her var hon so útgjørd sum hvalafangari við øllum teimum hvalagreiðum, ið eg á sinni við Prosperous bjargaði uppi við Jan Mayen frá einum hvalafangara, ið var sigldur á land har uppi. (Umrøtt aðra staðni í greinini.) Ein norðmaður førdi Betzy í tvey ár, men hvalaveiðan var so lítil, at eg var sendur til Keypmannahavnar við skipinum fyri at selja tað. Tó var tað áðenn avriggað sum hvalafangari.

Árini eftir fiskaði eg um summarið, og um heystið sigldi eg skip niður til Keypmannahavnar antin til at gera í stand ella við farmi.

## Fór at keypa sild

Eina ferð keypti eg eitt skip, Ida, frá toftamonnum, men fekk bert fýra mans hiðani frá, tí skipið var so ringt, at eingin vildi fara við tí.

Í Vestmannaoyggjunum fingu vit seks íslendingar við. Tá liðugt var við fiskiskapinum undir Íslandi, varð Ida seld.

Í teirri tíðini kostaði sildin 1 kr stykki. Um ár 1900 keypti eg Hurricane frá Sam. Olsen. Hon var gjørd um til eitt ísskip við frystirúmum, og sigldi eg síðan til Kristiansund tvey fylgjandi vár eftir sild. Vit kundu taka 130.000 sildir, og tær komu ísaðar umborð. Vit seldu tær í Føroyum fyri 8 oyru stykki. Seinna árið fekk eg 160.000 sildir. Men tá var tað við at ganga illa, tí í Føroyum var komin nógv sild tað várið, so einki kundi seljast. Eg fór so til Vestmannaoyggjarnar, har eg seldi sildina, so eg fekk fyri útreiðslurnar. Øll frystirúm vórðu so tikin úr skipinum. Eg fiskaði við tí og seldi tað síðani til Seydisfjarðar.

## 32 samdøgur úr Bergen til Havnar

Tá tey týsku herskipini lógu her undir fyrra krígnum og høvdu skjótiroyndir, var eg altíð loðsur umborð. Millum annað á tí kenda herskipinum Blücker.

Mangan ringan havi eg farið. Og serliga ein ferðin við Prosperous úr Noreg til Føroyar vil eg minnast leingi. Vit høvdu 32 samdøgur frá Bergen til Havnina, og tann dagin vit komu gjøgnum Nólsoyarfjørð, vildu fólk nærmast ikki vera við, at tað vóru vit, ið komu aftur. So vís vóru tey í, at vit vóru sjólátnir.

Mesanmasturin var brotin, og nógvur annar skaði var umborð. Tá høvdu vit rikist millum Føroyar, Ísland og Hetland alla tíðina.


Carl Johan Bech (1895-1988)


Ole Svend Olsen (1860-1936)

## Dagblaðið: Eitt prýði

Eitt prýði fyri okkara fólk var kapt. Svendsen í ungdóminum og eitt prýði er hann enn, har hann gongur millum okkum. Hansara lyndi er so, at mangir unglingar áttu at lært av Svendsen, at er ein glaður í huga, gongur tað gott í verðini, um mótstøðan av og á tykist at vera hørð.


Aftast í bátinum eru Carl Johan og Óla Svend. Hvør man tann fremsti maðurin vera?